

## Tablett, ið lovar roykistopp lovar ov nógv

**Nýggja tablettin, Champix, er ikki so virkin, sum framleiðarin Pfizer vil vera við.**

Um tú ætlar at leggja av at roykja, er nýggja tablettin Champix langt frá nakað undur. Umframt, at útlitini fyri at tað eydnast eru vánalig, kanst tú fáa marruna av viðgerðini, sum kostar 2400 krónur. Í danska Forbrugerráðnum sigur heilsupolitiski talskvinnan Margrethe Nielsen við Ekstra Blaðið, at heilivágsídnaðurin eigur at siga allan sannleikan, tá nýggjar vørur verða sendar á marknaðin.

## Fáir næmingar

Tá næmingarnir á Vinnuháskúlanum fóru aftur í skúla í morgun, vóru bara 16 nýggir næmingar. Av teimum ætla tíggju at læra til skipara og hinir seks til maskinmeistara. Seks næmingar er ikki nóg mikið til at byrja nýggjan flokk, og tí mugu teir nýggju maskinmeistaranæmingarnir ganga saman við skiparanæmingunum í summum lærugreinum. Í øðrum greinum mugu teir ganga saman við næmingum, sum eru komnir longri.

# Stýrið fyri Kringvarp Føroya sett

**Nýggja stýrið fyri Kringvarp Føroya er ovasta leiðslan á stovninum og hevur yvirskipaða ábyrgd av, at ásetingarnar í kringvarpslógini verða fylgdar.**

**Tey, sum eru tilnevnd í stýrið eru:**

Símun Absalonsen, grannskoðari, Tórshavn, formaður
Kristina Samuelsen, løgfrøðingur, Tórshavn, næstformaður
Páll Isholm, cand. mag., Syðrugøta
Krista Hvannastein, námsfrøðingur, Haraldssund
Eyðun Joensen, sálarfrøðingur, Tórshavn
Mia Pedersen, sjúkrarøktarfrøðingur, Vestmanna
Dia Midjord, journalistur, Tórshavn.
Durita Djurholm, HD í roknskapi, Tórshavn
Jógvan Fríðriksson, prestur, Gjaranes
Sigurlaug Nielsen, lærari, Vestmanna
Uni Næs, prestur, Fuglafjørður
Marita Dalsgaard, skúlastjóri, Glyvrar
Hjørdis Háberg Petersen, avgreiðslufólk, Kollafjørður
Herluf Sørensen, framleiðsluleiðari, Tórshavn

FJØLMIÐLAR

*Rigmor Dam*
*rigmor@sosialurin.fo*

Landsstýrismaðurin í mentamálum, Jógvan á Lakjuni, hevur sambært nýggju kringvarpslógini, sum kom í gildi á nýggjárinum, tilnevnt stýrið fyri Kringvarp Føroya.

Stýrið hjá Kringvarpinum er ovasta leiðslan á stovninum og hevur yvirskipaða ábyrgd av, at ásetingarnar í kringvarpslógini og aðrar fyriskipanir um virksemi stovnsins verða fylgdar.

Sambært kringvarpslógini verða fýra limir og fýra varalimir valdir eftir tilmæli frá politisku flokkunum, ein limur og ein varalimur verða valdir sum umboð fyri starvsfólkini í Kringvarpi Føroya, og landsstýrismaðurin í mentamálum tilnevnir tveir limir og tveir varalimir.

### Ymsar førleikar

Eftir tilmæli frá flokkunum hevur landsstýrismaðurin valt Kristinu Samuelsen, Páll Isholm, Eyðun Joensen og Miu Pedersen. Dia Midjord er valdur sum umboð fyri starvsfólkini. Landsstýrismaðurin hevur sjálvur valt Símun Absalonsen og Kristu Hvannastein. Landsstýrismaðurin hevur sambært kringvarpslógini tilnevnt formann og næstformann fyri stýrið.

Stýrislimirnir skulu, sambært lógini, samlað umboða førleikar, ið fevna um dyggan kunnleika til og innlit í føroysk samfelagsviðurskifti og mentan, fjølmiðlar og fíggjar- og roknskaparviðurskifti.



*Símun Absalonsen, grannskoðari, úr Havn, er formaður í nýggja stýrinum fyri Kringvarpið*

### Fíggjarligur formaður

Vit spurdu Jógvan á Lakjuni, landsstýrismann, hví hann valdi Símun Absalonsen til formann í stýrinum. Hann sigur, at tá hann sá samansetingina av nevndini, eftir at flokkarnir og kringvarpið høvdu valt síni umboð, varnaðist hann, at stýrinum vantaði ein persón við fíggjarligum førleikum.

– Símun Absalonsen er granskoðari og sera dugnaligur. Hetta er hetta orsøkin til, at eg valdi hann, sigur landsstýrismaðurin.

Símun Absalonsen hevði ikki hug at práta um nýggja sessin enn, tí hann vildi bíða til nevndin hevur verið saman um einar 14 dagar.

# Ekstra Bladet skrivar um føroyskar neyðrakettir

**Í Føroyum nýta tey neyðrakettir sum fýrverkarí nýggjársaftan, og tí er tað ikki nakað gott hugskot, at koma í havsneyð har, skrivar danska blaðið Ekstra Bladet**





Ekstra Bladet

NYHEDER

Forside
Nyheder
Sport
Underholdning
112
Læserbladet
Døgnets nyheder
Forbrug
Erhverv
Biler
Ferie
Verden på vrangen
EBblog
Gallerier
Web-tv
Sex & samliv
Spørg Joan Ørting
Side 9 pigen
Massage & Escort
Poker
Konkurrencer
Sudoku

**Nødraketter som fyrværkeri**

Print Send

**Det er ikke nogen god idé at komme i havsnød i færøsk farvand nytårsaften. Flere færinger bruger nødraketter som fyrværkeri**

/ritzau/ - 18:27 - 31. dec. 2006

Affyring af nødraketter, der har overskredet sidste salgsdato, er så udbredt på Færøerne nytårsaften, at et fartøj, der kommer i havsnød i færøsk farvand i timerne omkring årsskiftet, ikke kan forvente at få redningshjælp.

Når det nye år skydes ind på Færøerne, er himlen over øerne i Nordatlanten ikke blot oplyst af almindeligt fyrværkeri, men også af de mange nødraketter, som er blevet for gamle og skal skiftes ud med nye.

- Og ja, det er forbudt. Man må ikke affyre nødraketter, hvis man ikke har brug for hjælp. Men det forekommer desværre alligevel, at folk destruerer deres gamle nødraketter, når et nyt år skydes ind. Så man skal ikke komme i havsnød ved Færøerne i timerne omkring årsskiftet, siger vagthavende Christina Christiansen hos politiet i Torshavn.

Foruden fyrværkeriet er det blevet mere og mere udbredt i adskillige bygder og flere steder i de større byer at tænde bål, som de omkringboende hen under aftenen samles omkring.

Vejret er dog som altid en afgørende faktor, når det gælder udendørsaktiviteter på Færøerne. I år skulle vejret blive nogenlunde uden voldsom vind og regn.

NEYÐRAKETTIR

*Rólant Waag Dam*
*rolant@sosialurin.fo*

“Det er ikke nogen god idé at komme i havsnød i færøsk farvand nytårsaften. Flere færinger bruger nødraketter som fyrværkeri

Affyring af nødraketter, der har overskredet sidste salgsdato, er så udbredt på Færøerne nytårsaften, at et fartøj, der kommer i havsnød i færøsk farvand i timerne omkring årsskiftet, ikke kan forvente at få redningshjælp.”

Tað er á portali teirra, www.eb.dk, at Ekstra Bladet skrivar um neyðrakettir sum fýrverkarí í Føroyum nýggjársaftan.

Blaðið skrivar eisini, at tað í Føroyum er vorðið meiri og meiri vanligt at brenna bál nýggjársaftan.

“Foruden fyrværkeriet er det blevet mere og mere udbredt i adskillige bygder og flere steder i de større byer at tænde bål, som de omkringboende hen under aftenen samles omkring”, skrivar blaðið.

Um tað at brenna bál, er nakað nýtt fyribrigdið í Føroyum fara vit at loyva okkum at ivast í, men fara vit tó at geva blaðnum rætt, tá teir spáddu um veðrið nýggjársaftan.

”Vejret er dog som altid en afgørende faktor, når det gælder udendørsaktiviteter på Færøerne. I år skulle vejret blive nogenlunde uden voldsom vind og regn”, skrivaði Ekstra Bladet tann 31. desember á portali teirra, og í so máta fingu teir rætt, tí veðrið í Føroyum var frálíkt nýggjársaftan.

### Ongin tikin í Suðuroy

Í farnu viku skrivaðu vit í Sosialinum um, at í Suðuroy var eitt stórt leitiarbeiði farið í gongd, tá onkur hevði sæð eina neyðrakett eitt kvøldið. Bæði tyrlan og Tjaldrið fóru at leita, men funnu onki, og seinni hevur tað víst seg, at rakettin varð send av landi. Hetta er ólógligt og tí arbeiðir løgreglan við at finna út av, hvør tað er, sum hevur sent hesa neyðrakett. Enn er ongin tikin í málinum, men tá tað verður, so kann viðkomandi rokna við at fáa eina rokning upp á minst 50.000 krónur, sum tað kostaði at seta stóra leitiarbeiði í gongd.